## Heystferð í Stephanssons Húsi

Í dag klokkan 17 letur listakvinnan Rannvá Holm Mortensen upp framsýningina »Heystferð« í »Art Gallarí Stephanssons Hús« á Kongabrúnni í Havn. Á framsýningini eru 15 ymiskar litríkar myndir, sum tær flestu eru málaðar í ár. »Tað eru so nógvir møguleikar í myndum, og tað er júst hetta, sum er so dragandi« sigur Rannvá Holm Mortensen.



## Vinstri fær frammaná

Var fólkatingsval nú, hevði danski stjórnarflokkurin Vinstri fingið 21,3 prosent av atkvøðunum. Fyri einari góðari viku síðani gav ein kanning flokkinum 26,1 prosent, og á seinasta vali fekk flokkurin 29 prosent. Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at afturgongdin hevur helst samband við, at Thor Pedersen, fíggjarmálaráðharri, hevur víst aftur at geva almennu starvsfólkunum meiri løn. Sosialdemokratarnir eru sambært nýggju kanningini nógv tann størsti flokkurin í Danmark nú við 27,6 prosenum av atkvøðunum.

# Ein trong og stuttlig tíð

**Mikkal Helmsdal, rektari, minnist studentaskúlatíðina**

Hóast núverandi rektarin í Studentaskúlanum í Hoydølum longu fyrst í 80unum var fastur gestur á skrivstovuni hjá undangongumanni sínum Arnbjørn Mortensen, so mundi tað neyvan varnast unga næmingaráðsformannin, at hann ein dag skuldi enda sum rektari á Føroya Studentaskúla.

- Umframt næmingaráðið, var eg eisini politiskt virkin, spældi sjónleik og tónleik og var virkin í øllum møguligum øðrum enn skúlanum. So mongu átalurnar inni á skrivstovuni hjá Arnbjørn eru enn livandi fyri mær, har hann lýtir alfaðirliga at mær og inniliga heitir á meg um at taka skúlan í størri álvara og møta betur upp, sigur Mikkjal Helmsdal og flennir. Hann var nýmálslingur og byrjaði skúlanum í 1980. Av tí, at hann var eitt ár í USA, gjørdi hann seg lidnan í Hoydølum í 1984.

### Øgiligt trýst

Rektarin minnist fyrst av øllum tíðina í Hoydølum sum eina stuttliga, men eisini tronga, tíð.

- Umstøðurnar vóru sera trongar, minnist eg. Vit vóru líka nógvir næmingar sum nú, men kostdeildin var ikki bygt um til skúlastovur, og skúlin í Eysturoynni var ikki byrjaður enn. So tað var eitt øgiligt næmingatrýst, við nógvari skiftan millum stovur og langir skúladagar fyri at fáa alla undirvísingina avgreidda, minnist Mikkjal Helmsdal.

### Virkin ungdómur

Men flokkarnir, sum hann gekk í vóru góðir við nógvum samanhaldi, tónleika- og sjónleikavirksemi eftir skúlatíð.

- Politiska orðaskiftið fylti sum heild nógv, bæði studentapolitiska og spurningurin um høgra og vinstri. Eg var virkin í næmingaráðnum, og minnist enn eitt stríð við leiðsluna um møtiskylduna. Og so hendan polariseringin millum høgra og vinstri, millum annað við øgiligum kjaki um innihaldið í felagstímunum, har næmingar skipaðu mentunarlig tiltøk í auluni. Har hevði tað stóran týdning, at javnvág var millum høgra- og vinstravongin. So har var ein rættiligt stríð millum smáar, men markantar bólkar, sigur Mikkjal Helmsdal.

Hann heldur, at tað gav ein góðan dám, at báðar kostdeildirnar enn vóru í Hoydølum tá, tí har var ongantíð manntómt.

### Mitt í rokanum

Spurdur um hann kundi hugsað sær at verið næmingur í dag, sigur hann, at sjálvandi hevði tað verið stuttligt at verið 18 aftur.

- Hóast hølisumstøðurnar enn eru sera vánaligar, so hava næmingarnir nógv betri møguleikarnir eitt nú við at fara í dýpdina við tónleiki og sjónleiki. Var eg ungur og slapp at luttaka í sangleikum sum Fame, Sjeyk og Dreymakotið, so hevði eg verið mitt í rokanum, sigur Mikkjal Helmsdal.

- Men tað besta við at vera 18 er, at heimurin liggur opin fyri føtur tínar, sigur hann at enda.

**rd.**

# Opið hús í Hoydølum



*Opið hús verður í skúlanum í Hoydølum leygardagin 1. september, klokkan 13-16*

**Leygardagin eru 70 ár síðani, at Føroya Studentaskúli og HF-skeið - landsins størsti og elsti miðnámsskúli- varð settur á stovn. Hetta verður hátíðarhildið um vikuskiftið.**

STUDENTASKÚLIN 70

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Hoydølum fer at hátíðarhalda 70 ára dagin við at bjóða almenninginum til opið hús leygardagin, har ymsu lærugreinirnar fara at hava framsýningar, framførslur og kafétiltøk. Millum tiltøkini eru kaféir við mati frá ymsum mentanum, sum málfak skúlans eru knýtt at, umframt spurningaroyndir, har vitjandi kunnu royna sína almennu vitan innan søgu, mentan og náttúrvísind, umframt upplestur og tónleik. Listaframsýning verður við verkum hjá fyrrverandi næmingum, og eisini verður ein framsýning av teimum lærubókum, sum lærarar skúlans hava greitt úr hondum upp gjøgnum árini.

Kl. 14 verður eitt tiltak í samkomuhøll skúlans, har Mikkjal Helmsdal, rektari, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, flyta fram røður og blandað kór við næmingum og lærarum syngur.

Sunnudagin 2. september kl. 16 er almenn kvøldseta, har framførdir verða sangir úr teimum sangleikunum, sum næmingar skúlans hava framført seinastu 10 árini, filmsbrot verða víst og hugleiðingar um skúlan og søgu hansara bornar fram.

Skúlin heldur 70 ára dag sín fyri næmingunum við einum morgunmatarborði fríggjadagin 31. august. Leygarkvøldið 1. september verður hald fyri innbodnum á sjálvum skúlanum. Øll almennu tiltøkini í sambandi við 70 ára hald skúlans eru ókeypis.

Umframt virksemið í Hoydølum, er eisini virksemið hjá Miðnámsskúlanum í Suðuroy formliga partur av Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.